

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 06 - 2012

# Tangaskip á veg fram við pólinum

Tað er óvanliga lítil ísur á leiðunum norðan fyri Sibir, og tí verður roknað við, at hendan "nýggja" farleiðin verður opin longri í ár enn tey seinastu árini. Tað skrivar tíðindatænastan Barentobserver, sum veit at siga, at tangaskipini "Varzuga" og "Indiga" fóru úr Murmansk í gjár við kós eystureftir. Skipini eru fermd við olju, sum tey skulu leggja upp í ymsum bygdum økjum við sibirisku strondini. Tey seinastu árini hava skip siglt úr Evropa til Asia fram við sibirisku strondini. Farleiðin hevur serliga stóran týdning fyri skip, sum skulu til landnyrðinspartin av Asia, tí tá er siglingin umleið 40 prosent stytri, enn um skipini skuldu farið ígjøgnum Suezveitina. Tey seinastu árini hava skip eisini siglt ígjøgnum ta sokallaðu útnyrðingsleiðina, sum er norðan fyri Kanada og Alaska, tí har er ísurin eisini minkaður nógv tey seinnu árini.